## Gav Tevez fingurin

Gary Neville hevur enn einaferð sett seg sjálvan í fokus fyri gerðir, sum kanska eru væl dámdar á Old Trafford, men sum onnur fótbóltsfólk í Onglandi eru alt annað enn fegin. Tá Manchester-derby varð spælt fyrrakvøldið, rann Tevez yvir til beinkin hjá Manchester United, tá hann hevði skorað til 2-1. Her nýtti hann millum annað høvið til at siga Neville frá, at hann skuldi tiga við sínum útsagnum um fyrrverandi liðfelagan. Sjálvur helt Neville lítið um hetta, og aftursvarið til keipurnar hjá Tevez var ein fingur. Væntast kann, at báðir spælararnir nú skulu til hoyring fyri hendingina.



## Tríggir serbar til Sandoynna

B71 hevur gjørt avtalu við tríggjar serbar, um at hesir skulu hjálpa felagnum at lívbjarga sær í Vodafonedeildini. Sambært kringvarp.fo er talan um ein áleypara, ein miðvallarleikara og ein verjuleikara og teir eita Danilo Kovacevic, Marko Stanic og Bojan Zivic. Serbarnir koma ikki til landið fyrr enn 28. januar, men venjarin B71, Piotr Krakowski, hevur boðað frá, at restin av hópi hansara byrjar at venja fríggjadagin. Við teimum trimum serbunum aftrat hevur B71 nú fýra serbar í hópinum, tí málverjin Predrag Markovic er eisini frá Serbia. Hinvegin er ikki ein einasti brasiliumaður í hópinum. B71 hevur annars havt fleiri brasiliumenn knýttar at felagnum í nógv ár, men tann seinasti, Clayton Soares, sum spældi við í fjør, kemur ikki aftur.

# Anfield stuðlar Benitez

**Dirk Kuyt skoraði bæði málini, tá Liverpool í gjár vann 2-0 á Tottenham. Liverpool hevði fleiri møguleikar at avgera dystin, men ikki fyrr enn í seinastu løtu eydnaðist tað at fáa mál nummar tvey. Sosialurin var á Anfield, sum fleiri ferðir vísti sín stuðul til venjarin Rafael Bentiez.**



argetrondur@ofir.dk
Tróndur Arge



Hollendski Dirk Kuyt hevur ofta staðið fyri skotum, tí hann er ikki nóg vandamikil framman fyri mótstøðumálinum. Í gjárkvøldið var hann tó stóra hetjan á Anfield, tá hann skeyt bæði málini fyri eitt annars skert Liverpool

Mitt í seinna hálvleiki hevði Liverpool tveir stórar møguleikar at økja um leiðsluna, men báðu ferðirnar brendu teir. Frammanfyri sat ein garvaður Liverpool viðhaldsmaður, sum tók seg til høvdið og ýldi: "This is so typical!"

Liverpool hevur hetta kappingarárið fleiri ferðir mist á stokkinum. Seinast var leygardagin, tá Stoke javnaði í evstu løtu. Teir flestu áskoðarnir á søguliga partinum av Anfield, sum eitur The Kop, royndu at stuðla liðnum, men fleiri brúktu eisini tíðina uppá at bíta negl og halda fyri høvdið.

Á The Kop vóru áskoðarnir eisini í øðini inn á dómarin, tá hann kom fram til at tað skuldu spælast fimm minuttir av eykatíð. Ikki tí tað var so órættvíst, men heldur tí at teir vildu hava hann at bríksla fyri seinastu ferð.

Heldur ikki tá dómarin bríkslaði fyri brotssparki til Liverpool, vildu áskoðarnir taka nakað fyri givið. Stríðsmaðurin úr Hollandi, Dirk Kuyt var tryggur úr 11.metrum, men pínan bleiv enn eina ferð útsett, tí brotssparkið skuldi takast umaftur. Ikki fyrr enn tað brotssparkið endandi í málinum, vóru áskoðarnir vísir í at sigurin var heima.

### Stuðla Benitez

Fleiri miðlar vildu verða við, at um Liverpool tapti fyri Tottenham, so høvdu teir ongan møguleika at røkka 4. plássinum, sum gevur atgongd til Champions league.

Tað var eisini frammi at hetta kundi verða seinasti dysturin hjá Rafael Bentiez sum venjara hjá Liverpool, um teir taptu. Fyri Tottenham var hetta ein møguleiki at sláa fast, at teir ætla sær Champions League fótbólt komandi ár.

Liverpool, sum var uttan millum annað Steven Gerrard og Fernando Torres, stillaði upp við Dirk Kuyt einsamallum á toppinum. Tá tað gjørdist greitt fyri prátingarsama Liverpool-viðhaldsmanninum, ið sat frammanfyri segði hann stutt og greitt: "Kuyt is shit."

Viðhaldsmaðurin helt lítið um, at hollendingurin leygardagin brendi ein stóran møguleika móti Stoke, tá Liverpool spældi javnleik.

Dysturin var bara seks minuttir gamal, tá Dirk Kuyt rættaði uppá feilin frá leygardegnum. Stutt uttan fyri brotssteigin smekkaði hann til og bólturin fór í málið frammanfyri The Kop.

Gjøgnum allan dystin sungu áskoðarnir eyðkennislagið hjá Rafael Benitez, sum ein stuðul til spanska venjarin hjá Liverpool. Tað eru nógvar meiningar um Benitez, og nógv halda ikki at hann er rætti maðurin fyri Liverpool. Men leygardagin var ongin ivi, vanligi scousarin stuðlar honm framvegis.

Venjarin hjá Tottenham, Harry Redknapp, fekk hinvegin at vita, at hann skal fáa skil uppá síni skattaviðurskifti. Fyrr í vikundi var hann til avhoyringar í einum málið um skattasvik - slíkt fer sjáldan stillisliga framvið teimum ensku áskoðarunum.

### The shit

Eftir dystin segði sami Liverpool viðhaldsmaðurin við einum brosið: "I told you, Kuyt is THE shit," sum gevur eina heilt aðra mynd enn tað, ið hann segði undan dystinum.

Eftir dystin vóru flestu Liverpool áskoðarnir á einum málið um, at viljin er komin aftur á liðið. Við Jamie Carragher á odda, er liðið fari at stríðast meir.

Harry Redknapp segði eftir dystin, at Liverpool vunnu fult uppiborið, men var ikki heilt nøgdur við dømingina viðvíkjandi einum kolldømdum málið hjá Jermain Defoe. Rafael Benitez var eftir dystin fegin um at Liverpool nú nærkast 4. plássinum, sum er málið hjá Liverpool fyri hetta kappingarárið.

**Premier League**

| | dystir | v | - | j | - | t | vunnin mál | tapt mál | málmunur | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 Arsenal | 22 | 15 | - | 3 | - | 4 | 59 | 25 | 34 | 48 |
| 2 Chelsea | 21 | 15 | - | 3 | - | 3 | 52 | 18 | 34 | 48 |
| 3 Man Utd. | 22 | 15 | - | 2 | - | 5 | 49 | 19 | 30 | 47 |
| 4 Tottenham | 22 | 11 | - | 5 | - | 6 | 42 | 24 | 18 | 38 |
| 5 Man City | 21 | 10 | - | 8 | - | 3 | 42 | 30 | 12 | 38 |
| 6 Liverpool | 22 | 11 | - | 4 | - | 7 | 40 | 26 | 14 | 37 |
| 7 Aston Villa | 21 | 10 | - | 6 | - | 5 | 29 | 18 | 11 | 36 |
| 8 Birmingham | 21 | 9 | - | 6 | - | 6 | 21 | 19 | 2 | 33 |
| 9 Fulham | 21 | 7 | - | 6 | - | 8 | 26 | 24 | 2 | 27 |
| 10 Everton | 21 | 6 | - | 8 | - | 7 | 30 | 34 | -4 | 26 |
| 11 Stoke | 21 | 6 | - | 7 | - | 8 | 19 | 26 | -7 | 25 |
| 12 Blackburn | 21 | 6 | - | 6 | - | 9 | 23 | 39 | -16 | 24 |
| 13 Sunderland | 20 | 6 | - | 5 | - | 9 | 28 | 31 | -3 | 23 |
| 14 Wigan | 20 | 6 | - | 4 | - | 10 | 23 | 44 | -21 | 22 |
| 15 Burnley | 21 | 5 | - | 5 | - | 11 | 22 | 43 | -21 | 20 |
| 16 West Ham | 21 | 4 | - | 7 | - | 10 | 28 | 37 | -9 | 19 |
| 17 Wolves | 21 | 5 | - | 4 | - | 12 | 17 | 38 | -21 | 19 |
| 18 Hull | 21 | 4 | - | 7 | - | 10 | 20 | 42 | -22 | 19 |
| 19 Bolton | 20 | 4 | - | 6 | - | 10 | 28 | 42 | -14 | 18 |
| 20 Portsmouth | 20 | 4 | - | 2 | - | 14 | 18 | 32 | -14 | 14 |